## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Klivin - ein spennandi avbjóðing

**Fríggjadagin 4. februar var móttøka mótahandlinum í Klivanum í SMS í sambandi við at Heibrith Jacobsen og Vagna Sørensen yvirtóku handilin hósdagin 27. januar 2005**

MÓTTØKA

*Myndir: Magnus Gunnarsson*

Eftir at handlarnir í SMS stongdu kl. 19.00 fríggjakvøldið var móttøka í mótahandlinum klivanum, har nógv av teimum sum starvast í teimum ymisku handlunum í SMS og fleiri onnur – vinir og kenningar – stukku inn á gólvið og heilsaðu upp á nýggju eigararnar.

Eisini fyrrverandi eigarin, Katrin í Gongini, sum stovnaði handilin fyri 17 árum síðum heilsaði upp á fyrrverandi viðskiftafólk og starvsfelagar.

Umleið hundrað fólk stukku inn á gólvið til móttøkuna.

Heibrith hevur arbeitt í Klivanum síðan 1993, meðan Vagna arbeiddi har frá 2002 til 2004. Báðar siga tær, at hetta er ein dreymur hjá teimum báðum og ein spennandi avbjóðing.



*Eigararnir av Klivanum saman við monnunum, f.v.: Eyðstein og Heibrith Jacobsen og Vagna og Øssur Sørensen*



*SMS prát, Kári og Malan Justiunssen, Katrin í Gongini og Kári Árting*



*Verforeldrini hjá Vagnu Sørensen: Olevina og Thorkil Sørensen*



*Foreldrini hjá Heibrith Jacobsen: Heini og Ingibjørg Heinesen*



*Nicolina Højgaard og dótturin Tóra*



*Emma Winther lækni, mamma fyrrverandi eigaran av Klivanum, Katrin í Gongini*



*Vagna Sørensen og Rógvi Róin frá SMS*



*Myrna Hjaltalin, Marita Tórsheim, og Vivi Nielsen*